# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 28.06.2021 |
| Mál nr.: | 21/01380 |
| Málsviðgjørt: | NF |
| Ummælistíð: | 23.03-03.05.2021 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**Føroya Kærustovn**

**§ 1.** Føroya Kærustovnur er ein fyrisitingarmyndugleiki, sum er fevndur av fyrisitingarlógini og virkar óheftur av landsfyrisitingini.
*Stk. 2.* Avgerðir Kærustovnsins kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.
*Stk. 3.* Kærustovnurin virkar fyri, at tað verða tiknar skjótar og rættar avgerðir stundisliga. Virksemið hjá Kærustovninum er grundað á meginregluna um, at øll eru líka og hava sama rætt sambært lógini.

*Virkisøki*

**§ 2.** Føroya Kærustovnur er kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir, tá ið tað er ásett í lóg, løgtingslóg ella við heimild í løgtingslóg. Harumframt tekur Kærustovnurin avgerð í málum, tá ið tað er ásett í løgtingslóg.
*Stk. 2.* Er ikki annað ásett, er freistin at kæra 4 vikur at rokna frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Í serligum føri kann Kærustovnurin viðgera kærumál, ið eru latin inn, eftir at kærufreistin er farin.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um virksemið hjá Kærustovninum.

**§ 3.** Kærustovnurin tekur avgerð í teimum málum, ið verða løgd fyri stovnin.

*Heimildir stjórans at taka avgerðir í serligum málum*

**§ 4.** Stjórin kann gera av, at ein avgerð hjá Kærustovninum, skal takast upp aftur til nýggja viðgerð, tá ið hetta er ivaleyst, og talan ikki er um eitt mál av grundleggjandi týdningi**.**
*Stk. 2.* Stjórin kann játta ella sýta steðgandi virknað í kærumálum, tá ið slík avgerð ikki tolir at bíða.
*Stk. 3.* Eisini kann stjórin gera av, um kærarin er partur í málinum, um kærufreistin er hildin, og um kært er til rætta myndugleika.

*Stk. 4.* Stjórin kann lata øðrum starvsfólki á Kærustovninum heimildir sínar sambært stk. 1-3.
*Stk. 5.* Hevur mál sambært stk. 1-3 grundleggjandi týdning, skal Kærustovnurin setast.

*Setan av Kærustovninum*

**§ 5.** Kærustovnurin verður settur við stjóranum og tveimum løgfrøðingum.
*Stk. 2.* Í serligum førum kann stjórin gera av, at Kærustovnurin verður settur við stjóranum og fýra løgfrøðingum.
*Stk. 3.* Í málum, har serligur serkunnleiki verður mettur neyðugur fyri viðgerðina, kann Kærustovnurin verða settur við stjóranum og einum ella tveimum løgfrøðingum umframt einum ella tveimum viðkomandi serkønum.
*Stk. 4.* Um ikki annað er ásett ger stjórin av, um mál skulu viðgerast eftir stk. 1, 2 ella 3, og hvør mannar Kærustovnin í einstøku málunum. Stjórin kann gera av, at mál, sum er byrjað sum vanlig viðgerð eftir stk. 1, skal flytast til viðgerð sambært stk. 2 ella 3.
*Stk. 5.* Stjórin kann gera av, at í staðin fyri ein av løgfrøðingunum kann Kærustovnurin setast við einum persóni við øðrum viðkomandi serkunnleika.

*Avgerðir hjá Kærustovninum*

**§ 6.** Avgerðir Kærustovnsins sambært § 5 verða tiknar við vanligum meiriluta, eftir at fundur er hildin um málið. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er atkvøða stjórans avgerandi. Øll hava skyldu til at greiða atkvøðu.
*Stk. 2.* Stjórin kann gera av, at serkøn luttaka á fundi uttan av hava atkvøðurætt.

**§ 7.** Kærustovnsins avgerð kann vera: burturvísing, staðfesting, avtøka ella broyting av tí kærdu avgerðini. Kærustovnurin kann eisini afturvísa málið til nýggja viðgerð ella beina málið til viðgerðar hjá einum myndugleika, sum ikki áður hevur tikið avgerð í málinum.
*Stk. 2.* Kærustovnurin er ikki bundin av málskrøvum partanna.
*Stk. 3.* Avgerðir hjá Kærustovninum skulu fráboðast skrivliga og skulu vera grundgivnar.

*Útbúgvingarkrøv*

**§ 8.** Stjórin á Kærustovninum skal hava løgfrøðiligt embætisprógv og hava royndir í fyrisiting ella øðrum viðkomandi fakøki.
*Stk. 2.* Løgfrøðingarnir, sum skulu taka avgerð eftir §§ 5-7, skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv ella aðra samsvarandi útbúgving.

*Serkøn ráðgeving*

**§ 9.** Kærustovnurin fær sær neyðuga serkøna ráðgeving eftir tørvi.
*Stk. 2.* Val av serkønum skal vera grundað á teirra fakligu førleikar og eftir tilmæli frá yrkisbólkum, har tað ber til.
*Stk. 3.* Serkøn verða vald fyri 3 ár í senn.
*Stk. 4.* Serkøn fáa løn ella samsýning, sum landsstýrismaðurin ásetir.
*Stk. 5.* Serkøn, sum ikki eru starvssett í Kærustovninum, hava í sínum virksemi fyri Kærustovnin somu tagnarskyldu sum almenn starvsfólk sambært § 26 í fyrisitingarlógini.

*Kærur*

**§ 10.** Kæra skal sendast skrivliga til Kærustovnin og skal, har tað ber til, vera grundgivin og hava próvskjøl hjáløgd.
*Stk. 2.* Allar upplýsingar, so sum ummæli, váttanir o.a., ið verða mettar neyðugar fyri at kunna viðgera og taka avgerð í málinum, skulu verða fingnar til vega, áðrenn málið verður lagt fyri Kærustovnin til avgerðar.
*Stk. 3.* Tann myndugleiki, ið hevur tikið ta kærdu avgerðina, hevur skyldu til at lata Kærustovninum allar upplýsingar, sum hava verið grundarlag undir kærdu avgerðini.
*Stk. 4.* Kæra hevur ikki steðgandi virknað uttan so, at hetta er ásett í aðrari lóggávu. Um serligar umstøður tala fyri tí, kann Kærustovnurin gera av, at ein kæra fær steðgandi virknað.

*Onnur mál enn kærumál*

**§ 11.** Umsóknir, tilmæli o.a., har Kærustovnurin sambært § 2 skal taka avgerð, verða send Kærustovninum skrivliga.
*Stk. 2.* Allar upplýsingar, ið verða mettar neyðugar fyri at kunna viðgera og taka avgerð í málinum, skulu verða fingnar til vega, áðrenn málið verður lagt fyri Kærustovnin til avgerðar.

*Almannakunngering av avgerðum og ársfrágreiðing*

**§ 12.** Ein umboðandi partur av avgerðunum, sum Kærustovnurin hevur tikið, skulu almannakunngerast. Avgerðir, sum verða kunngjørdar, skulu vera navnleysar og gjørdar so ókenniligar sum gjørligt.
*Stk. 2.* Tá ið avgerðir verða valdar til almannakunngering, eigur serligur dentur at verða lagdur á, at avgerðirnar hava meginregluligan ella almennan týdning fyri siðvenjuna á økinum.
*Stk. 3.* Avgerðirnar kunnu almannakunngerast í øllum miðlum.

**§ 13.** Kærustovnurin ger eina ársfrágreiðing um virksemi sítt, sum skal almannakunngerast.

*Rættur partanna at møta í Kærustovninum*

**§ 14.** Kærustovnurin eigur eftir áheitan ella kann av sínum eintingum geva pørtunum og øðrum høvi til at siga fram sína áskoðan munnliga fyri Kærustovninum.

*Skiftistíðarskeið*

**§ 15.** Tann 1. januar 2022 verða hesar kærunevndir tiknar av og virkisøkið flutt til Kærustovnin:

1) Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum.
2) Skatta- og avgjaldskærunevndin.
3) Kærunevndin hjá Studna.

*Stk. 2.* Tann 1. juli 2022 verða hesar nevndir og kærunevndir tiknar av og virkisøkið flutt til Kærustovnin:

1) Kærunevndin í lendismálum.
2) Vinnukærunevndin.
3) Skuldarumskipanarnevndin.

*Stk. 3.* Tann 1. januar 2023 verða hesar kærunevndir tiknar av og virkisøkið flutt til Kærustovnin:

1) Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini, ALS.
2) Kærunevndin hjá Barsilsskipanini.

*Stk. 4.* Tann 1. juli 2023 verða hesar nevndir og kærunevndir tiknar av og virkisøkið flutt til Kærustovnin:

1) Høvuðsbarnaverndarnevndin.
2) Psykiatriska sjúklingakærunevndin.

*Stk. 5.* Tann 1. januar 2024 verður Tvingsilsnevndin tikin av og virkisøkið flutt til Kærustovnin.

**§ 16.** Inntil allar kærunevndir og nevndir sambært § 15 eru tiknar av, virkar Kærustovnurin í skiftistíðarskeiðnum til 1. januar 2024 sum skrivstova hjá hesum kærunevndum og nevndum.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 17.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Kæra send til kærunevnd og nevnd sambært § 15, og sum ikki er avgreidd, tá ið viðkomandi kærunevnd ella nevnd verður tikin av, viðger og avgreiðir Kærustovnurin sambært reglunum í hesi løgtingslóg.